## Bara ein trolari eftir

Ísfiskatrolarin Rasmus Effersøe er nú seldur til Uruguay, upplýsir reiðarin Gudmund Mortensen. Í løtuni stendur skipið á beding í Havn og fer helst av landinum í vikuni, skrivar heimasíðan skipini.com. Gudmund Mortensen reiðari vil ikki upplýsa søluprísin, men sigur at prísurin er sámiligur. Rasmus Effersøe er blivin til veitingarskip, og hevur verið ein túr uppi í Grønlandi, meðan hann var undir føroyskum flaggið. Teir, ið hava meklað søluna eru meklararnir PO Brokers. Gudmund Mortensen reiðari sigur eisini at sum landið liggur íløtuni keypa teir onki nýtt skip fyri Rasmus Effersøe, ið nú er seldur, og seldur uttan fiskiloyvið.



## Ellis- og røktarheim fyri 45 mió krónur

Landsverk er í løtuni við at leggja seinastu hond á samlaðu kostnaðarmetingina í samband við byggingina av Ellis- og røktarheiminum og deplinum fyri sinnisveik í Vági, skrivar Suðuroyarportalurin.fo. Sambært landsverkfrøðinginum og arkitekti, sum Suðuroyarportalurin hevur tosað við, er líkt til, at ellis- og røktarheimið í Vági kemur at kosta 45-50 mió. kr. Hetta er umleið 10 mió. kr. hægri enn upprunalig mett í 2006.

## Fíggjarætlanin á borðið í Porkeri

Eftir at kommunuvalið er av í annaðkvøld, fara sitandi kommunustýri at leggja seinastu hondina á fíggjarætlanina fyri 2009. Eitt av hesum bygdarráðum er tað í Porkeri, har boðað er til eyka bygdaráðsfund tórsdagin 13. november við trimum málum á skránni. Fyrsta mál á skránni er 1. viðgerð av fíggjarætlanini fyri komandi ár. Annað málið er eitt um útskifting av vindeygum í skúlanum, og triðja og seinasta málið er Ymiskt. Fundurin byrjar kl. 18.

## 600 útlendingar velja fyrstu ferð

35.461 fólk hava valrætt á kommunuvalinum, sum verður týsdagin í teimum tilsamans 34 kommununum í landinum. Teirra millum eru stívliga 600 útlendingar, sum fyri fyrstu ferð kunnu velja á kommunuvali í Føroyum. Lógin um val til kommunustýrini varð broytt í 2006, soleiðis at eisini útlendingar, sum hava búð í Føroyum seinastu trý árini undan valinum, hava valrætt. Umhvørvisstovan, ið hevur ábyrgdina av lógini um landsfólkayvirlit, hevur seinastu dagarnar havt úr at gjørt við at fingið valkortini út til øll tey, sum hava valrætt, skrivar uf.fo.

# Skralltómur kommunukassi hóast sølu av Vesturvón

**Kritikkurin heglar niður yvir leiðsluna í Sørvágs kommunu. Níggju valevni eru á Lista B, ið stilla upp ímóti sitandi bygdarráði. - Sagt verður, at kommunan er væl fyri, men sannleikin er, at kommunukassin er skralltómur, hóast sølan av Vesturvón gav kommununi 42 milliónir, sigur eitt av valevnunum, Heðin Jørgensen**



*Sitanadi bygdarráð í Sørvági fær harðar ábreiðslur frá valevninum, Heðin Jørgensen, fyri at hava tømt kommunukassan*

KOMMUNUVAL
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Eingin ivi man vera um, at nógv er hent í Sørvági í farna valskeiði. Í valblaðnum í vikuskiftisútgávuni var samrøða við sitandi borgarstjóra í Sørvági, Jákup Suna Lauritsen, sum kundi peika á eina langa røð av málum, sum kommunan hevur fingið av skafti seinastu fýra árini. Nógvar íløgur eru gjørdar, millum annað eru allar gongurbreytirnar lagdar við flísum. Kommunan hevur havt fitt av peningi at gera gott við eftir søluna av Vesturvón á heysti 2005, sum gav kommuni 42 mió. krónur í vinningi. Hetta ger góðan mun hjá eini kommunu hvørs skattainntøkur liggja um 27-30 mió. krónur um árið.

Men meðan borgarstjórin sjálvur letur væl og ger greitt, at hann fegin tekur eitt valskeið afturat, eru tað onnur, ið ikki eru eins hugtikin av verandi støðu í flogvallarkommununi. Ein listi við níggju valevnum stillar nevniliga upp ímóti verandi bygdarráði, og eitt av valevnunum á hesum lista, Heðin Jørgensen, heldur støðuna vera syndarliga á fleiri økjum, eitt nú á røktarøkinum.

– Hví hevur Sørvágs kommuna ikki útvegað fleiri búðpláss til eldru borgararnar, ið hava tørv á røktarplássi. Her mangla bæði varandi búðpláss og umlættingarpláss. Sum støðan er, noyðast hesir borgarar av oynni til umlættingar orsakað av vantandi samstarvsvilja við grannakommunurnar, sigur Heðin Jørgensen.

### Kommunsamanlegging er tabu

Upp á fyrispurning upp á, um Sørvágs kommuna hevur ætlanir um at leggja saman við hinar størru kommunurnar í Vágoynni segði Jákup Suni Lauritsen í valblaðnum, at hetta ikki hevur sama skund fyri Sørvág, sum tað hevði fyri Miðvág og Sandavág.

– Tær báðar kommunurnar hava samstarvað á nógvum økjum í langa tíð, og tá man hevur livað saman so leingi er væl eisini tíð upp á at fáa pappír upp á hvønn annan, segði Jákup Suni Lauritsen.

Heðin Jørgensen heldur tað vera nógv fyri, at borgarar í kommununi ikki verður hoyrdir í hesum týðandi máli, eins og borgararnir hava verið tað í hinum kommununum.

– Kommunusamanlegging hevur verið eitt tabu hjá sitandi bygdarráði, og tað er løgið tá hugsað verður um, at hinar kommunurnar hava latið borgararnar sjálvar sloppið at tikið støðu til málið við atkvøðugreiðslu, sigur Heðin Jørgensen.

### Skralltómur kommunukassi

Heðin Jørgensen er sum vera man ikki mjúkur at strúka í síni eftirmeting av avrikum bygdarráðsins í farna valskeiði og heldur, at bygdarráðið hevur oyðslað meiri enn gott er, so nógv at kommunukassin í dag er tómur, hóast kassin var á tremur eftir søluna av Vesturvón tíðliga í valskeiðnum.

– Tá sagt verður at kommunan er væl fyri fíggjarliga, so er veruleikin ein heilt annar. Kommunan hevur nevniliga brúkt 80 milliónir upp á íløgur í fýra ár við tí úrsliti, at kommunukassin í dag er skralltómur, sigur hann og heldur fram:

– Raksturin av Sørvágs kommunu, umfatandi Mykines, Gásadal, Bø og Sørvág samanlagt, er vaksin úr 15 mió. krónum í 2002 upp í 26 mió. krónur í 2007, sum er ein vøkstur á 73 prosent eftir 5 árum.

– Umsitingin í Sørvági er ikki ment at bera nógv virksemi, hetta vísir seg millum annað við, at borgarar ikki fáa svar upp á skriv, teir senda inn, sigur Heðin Jørgensen, sum tó leggur dent á, at fólkini í umsitingini gera eitt megnararbeiði, men at tað er borgarstjórin sjálvur, sum ikki fær avgreitt málini.

Á heimasíðuni www.123hjemmeside.dk/listiB hevur Listi B hópin av skortfleingjum afturat til sitandi bygdarráð, og Heðin Jørgensen heldur sær ikki aftur, men sigur millum annað: »Tað ljóðar løgið, at vit nú, eftir at kassin hevur verið um at bresta, og ikki klingur er eftir, skulu gera ábøtur sum duttu niðurfyri í kreppuni í 90'unum. Tey sum nú ganga í skúla vóru nóg illa fødd, tá kreppan leikaði á. Hví varð hetta ikki gjørt, tá vit áttu pengar?«